## Starv sum ergoterapeutur til Heimatænatuna hjá VEKS

Vit sóknast eftir einum ágrýtnum, jaligum og hugskotsríkum ergoterapeuti til Heimatænastuna í VEKS.

Starvsbrøkur er 0,8 og byrjunardagur eftir nærri avtalu.

**Tilvísing**

Starvið hevur tilvísing til leiðaran fyri Heimatænastuna í VEKS

**Førleikakrøv**

- Útbúgving og góðkenning sum ergoterapeutur.
- Áhuga fyri at dagføra fakliga førleikan innan terapeutiska øki.
- Góð samstarvs- og samskiftisevni.
- Vilja og evni at virka í einum tvørfakligum toymi.
- Evnir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hava lætt við at samskifta, bæði í bólki og við hvønn einstakan.
- Virkisfýsni og áhuga í at menna terapeutiska virksemið og sosiala umhvørvið í síni heild, í tøttum og uppbyggjandi samstarvi við leiðslu, starvsfólkahóp og einstaka borgaran.
- Telduførleika á brúkarastøði.
- Koyrikort til persónbil.

**Arbeiðsuppgávur**

- Skipa og útinna fyribyrgjandi venjingar, endurvenjingar v.m. bæði í bólkum og hjá tí einstaka borgaranum.
- Vera við til at menna strategisk, faklig og praktisk viðurskiftir innan tað terapeutiska økið.
- Samstarva við m.a. visitator innan terapeutiska partin í samband við visitering, heimavitjanir v.m.
- At stuðla undir, at eldri borgarar varðveita, menna ella endurvinna sínar virkisførleikar.
- Heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi venjingar og onnur átøk fyri eldri borgarar.
- Undirvísa og ráðgeva starvsfólkum, borgarum og avvarðandi.
- At kanna, greina og meta um virkisførleikar, og í mun til hetta, at seta neyðug átøk í verk.
- Innan terapeutiska øki vegleiða og undirvísa starvsfólkahópi og einstaka brúkaranum.
- Tryggja og menna gott samskifti og høgt kunningarstøðið, bæði til borgarar, starvsfólk og aðrar samstarvspartar.

**Vit kunnu bjóða**

- Góðar umstøður og fjølbroyttar avbjóðingar, har tú fært møguleika at seta tín dám á, og verða partur av framhaldandi menning av tilboðum og tænastum.
- Dugnaligar starvsfelagar
- Jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi

**Setanar- og lønarviðurskifti**

Setanarstaðið er Heimatænastan í VEKS.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið/ Kommunala Arbeiðsgevarefelagið og Ergoterapeutfelagið.

**Umsókn**

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, lívsrensli (CV), viðmælum v.m. skal sendast til

veks@veks.fo

ella

**Heimatænastan í VEKS**
**Bakkavegur 59**
**350 Vestmanna**

**Freist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 12. desembur.**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til

Niels A. Joensen, tlf. 260552 ella teldupost nielsj@veks.fo

– – – – –

Heimatænastan í VEKS er eitt kommunalt samstarv millum Vestmanna- Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda Kommunu. Nærri lýsing av virkseminum sæst á heimasíðu okkara www.veks.fo .